FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 10. mars 2021
J. nr.: 21/00091
Viðgjørt: AE

Svar upp á fyrispurning: nr. 52-091/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Hasfjord.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu ofta hevur Hasfjord verið á sleipistøð og/ella til umvælingar, síðan ferjan kom til landið?

2. Hvussu nógv hevur tað higartil kostað at umvæla, rætta brek, keypa eykalutir og annað á ferjuni, síðan hon kom til landið?

Svar til fyrispurning nr. 1
Strandfaraskip Landsins tørvaði eitt skip til at sigla tungan farm til Sandoynna og var Hasfjord keypur úr Noregi til endamálið í desembur 2019.

Umvælingar vóru gjørdar í Noregi og síðan í Føroyum, fyri at lúka tey krøv, sum Skipaeftirlitið setir fyri at skipið kann fáa siglingarloyvi. Hasfjord hevur eisini ferðafólkaloyvið til 12 ferðandi. Skipið fór í sigling 8. mai 2020.

Hasfjord bar við botn í innsiglingini í Skopun 24. juni 2020. Nú skipið var í dokk varð avgjørt eisini at vatnblása og mála botnin á Hasfjord, soleiðis at alt arbeiðið varð gjørt um eina leið. Hasfjord skuldi annars á beding seinri í árinum til sama arbeiði. Skipið fór í sigling aftur 21. juli 2020.

Trupulleikar vóru við høvuðspumpuni til bógskrúvuna 19. februar 2021, og var skipið tikið úr sigling, fram til 2. mars 2021. Harumframt hevur onkur einstakur túrur ikki verið sigldur vegna umvælingar.

Skipið siglir vanliga týsdag, mikudag, hósdag og fríggjadag, og hevur bert mist eini 20 vanligar siglingardagar.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til fyrispurning nr. 2
Tað vóru játtaðar 10. mió. kr. í 2019 til at keypa farmaskip, og til at gera neyðugar umvælingar, tillagingar o.a., fyri at lúka tey krøv klassin setur. Strandfaraskip Landsins hevur upplýst, at skipið sjálvt kostaði 3,5 mió. kr. og umvælingarnar 3,5 mió. kr. Sostatt kostaði tað 7,0 mió kr. at gera skipið siglingarklárt.

Og Strandfaraskip Landsins hevur upplýst, at umvælingar, tillagingar og annað, sum eru gjørdar eftirfylgjandi, hava kostað eini 2,0 mió. kr.

Tinganes, 10. mars 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum